# Skulu hava frið til inn-kast

Frá 1. juli koma nakrar ajourføringar av fótbóltsreglunum í gildi.

Tað er nevndin hjá FIFA, sum hevur stungið hesar út í kortið, og tó at talan er um fleiri smávegis broytingar, so er bara ein teirra, sum veruliga tykist at fáa ávirkan.

Framyvir verður tað nevnliga so, at tað er ikki loyvt at stilla spælara beint framman fyri mótstøðumann, tá hesin skal taka innkast. Tað hevur seinnu árini verið ein tendensur til, at hetta er nakað, sum verjani liðið nýtir alt meira, men við nýggju reglunum verður hetta steðgað. Nú skal spælari hjá verjani liðnum í øllum førum halda ein frástøðu upp á tveir metrar við innkast.

Í aðrar mátar er talan um smávegis justeringar í reglunum. Eitt nú verður off-side reglan ajourførd nakað, soleiðis at tað nú skal metast, hvørt høvd ella bein eru innanfyri verjuna, tá bólturin verður spældur, men hetta fær helst ikki nakran stórvegis praktiskan týdning. Somuleiðis verður lagt upp til, at vandamiklar tacklingar nú skulu revsast harðari, óansæð um hesar koma aftan ífrá ella ikki. Men eisini her er spurningurin helst, hvørt broytingarnar veruliga fáa nakran praktiskan týdning.

-jm

TB-EB/Streymur 1-1 (0-1):

# Gestirnir mistu á stokkinum



*TB megnaði í evstu løtu at vinna sær javnleikin móti EB/Streymi, og fingu teir soleiðis bjargað nakað av stevnuhýrinum*

*savnsmynd*

**Eftir at teir høvdu verið frammanfyri í ein tíma mistu teir í EB/Streymi tvey stig í yvirtíðini á Sevmýri**

TB-EB/STREYMUR
*Jóannes Hansen*

Jóansøkuhýrurin tóktist skula fáa orduligt skot fyri bógvin í góðveðrinum á Sevmýri leygarkvøldið. Men so var tað, at Emmanuel Larby syrgdi fyri, at eitt stig varð eftir á Sevmýri. TB viðhaldsfólkini fegnaðust sum um, at tað var teirra lið, sum hevði vunnið. Tað var væl skiljandi, tí talan var næstan um síðsta sparkið av øllum, tá ið Larby sendi í kassan.

EB/Streymur hevði tá í góða løtu roynt at draga tíðina út. Vanliga leggja dómararnir ein hálvan minutt afturat fyri hvørja útskifting. EB/Streymur framdi tríggjar útskiftingar, og tann síðsta varð gjørd, tá ið klokkan var farin av 90 minuttum, og tað var eftir hana, at Emmanuel Larby javnaði til 1-1.

TB trýsti nógv síðstu løtuna, og eftir at vandamiklu spælararnir í EB/-Streyma álopinum vóru farnir av vøllinum (Sorin Anghel eftir at hann hevði fingið lítlan løst), tóktist vandin fyri, at gestirnir skuldu fara í mótálop ikki at vera so stórur.

Í evstu sekundunum snittaði Acic langa framlegging víðari. Óli Johannesen royndi ímóti málinum. Bólturin varð blokeraður til innskifta Búa Dahl, sum royndi eina ferð afturat. Men enn eina ferð blokeraðu EB/Streyma menninir. Hesa ferð fór bólturin til Emmanuel Larby, sum bara tveir metrar frá málinum stýrdi honum inn um strikuna aftanfyri Magnus Poulsen, og so var gleði kring vøllin á Sevmýri.

Gestirnir úr Sundalagnum, sum høvdu Egil á Bø sum hangandi álopsspælara aftanfyri Sorin Anghel, hingu við høvdinum. Teir høvdu verið so tætt við at fingið øll trý stigini, sum tað ber til at vera. Men sæð í bakkspeglinum kundu teir kortini gleðast um, at tað hesa ferð hevði hilnast betri, enn tað gjørdi, tá ið teir fyrru ferðina vóru á Sevmýri og taptu 3-0.

Hans Pauli Samuelsen skoraði EB/Streyma málið miðskeiðis í fyrra hálvleiki. Heimaverjan, sum annars plagar at vera tryggleikin sjálvur, og sum annars eisini hesa ferð stóð stinn, var ikki vakin, tá ið vongverjin, Gert Hansen, sum eisini er hondbóltsspælari, tveitti ógvuliga langt innkast. Hóast hann tóktist at vera væl ansaður, og eydnaðist tað Sorini Anghel við høvdinum at snitta bóltin longri inn fyri málið til Hans Paula Samuelsen, sum sera hegnisliga og neyvt og uttan ta stóru ferðina, fluktaði bóltin í málið.

### Ikki nóg støðugur

Milan Milanovic, TB venjarin, heldur, at sum dysturin tók seg upp, og tá ið tað ikki eydnaðist teimum at fáa mál fyrrenn í síðstu sekundunum, so kunnu teir ikki annað enn vera nøgdir:

- Vit løgdu væl fyri, men tá ið teir høvdu fingið málið, var tað sum um, at spælið hjá okkum datt sundur, og aftaná tað høvdu vit ikki so nógv at bjóða uppá. Luturin hjá okkum er at stríðast fyri at sleppa undan niðurflyting, og tað ber spælið hjá okkum brá av. Eg vil hava, at vit samanspæla og ikki sparka. Tað eydnast væl í løtum, men vit eru ikki nóg støðugir. Eftir at tað hevur sæð gott út eina løtu, so renna vit okkum í periodur, tá ið tað ikki sær so væl út. Men spælararnir hjá okkum skulu eiga rós fyri, at teir leygardagin hildu fram at stríðast, og tað bar í síðsta enda eitt stig við sær, og tað eru vit sera fegnir um, sigur TB venjarin.

Milan Milanovic roknar við ógvuliga torførari uppgávu næstu ferð, tá ið TB skal spæla í Gøtu.

- GÍ hevur fingið vind undir veingirnar. Teir spæla væl, og teir trúgva uppá, at tað skal bera til. Sunnudagin megnaðu teir 1-1 í Runavík, og tað er gott úrslit. Í fótbóltinum gongur tað upp og niður. Í Runavík mistu vit tvey stig, tá ið NSÍ skoraði til 1-1 við síðsta sparkinum. Nú vóru tað vit, sum við síðsta sparkinum fingu javna til 1-1.

## FAKTA UM DYSTIN

**TB-EB/Streymur 1-1 (0-1)**
0-1: Hans Pauli Samuelsen 26.
1-1: Emmanuel Larby 90.
**Dómari:** Páll Augustinussen
**TB:** Predrag Markovic - Predrag Zivkovic (Birgir Rasmussen, 71.), Óli Johannesen, Aca Petrovic, Jón Johannesen - Olivur Abrahamsen, Alexander Jovevic, Bárður Dimon, Einar Petersen (Búi Dahl, 71.) - Hallur Christiansen (Allan Poulsen, 59.), Emmanuel Larby
**Gult kort:** Bárður Dimon, Aca Petrovic
**EB/Streymur:** Magnus Poulsen - Bárður Olsen, Fróði Clementsen, Andrzej Pacek, Gert Hansen - Hans Pauli Samuelsen (Teitur Joensen, 90.), Marni Djurhuus, Knút Vesturtún, Jákup Martin Joensen (Esmar Eiðisgarð, 68.) - Egil á Bø, Sorin Anghel (Sonni L. Petersen, 79.)
**Gult kort:** KnútVesturtún